# Politiið kannar skattabøtur

**Taks hevur sent politinum umleið 20 mál, har fólk ikki hava góðkent sektaruppskotið fyri ikki at hava uppgivið vinningin av sølu av partabrøvum**

Randi Jacobsen

Um tú selur partabrøv við vinningi, skal inntøkan setast á sjálvuppgávuna.

Antin við vilja ella av óskektni vóru tað fleiri fólk, sum ikki góvu upp vinningin, og tá ið Taks í 2007 fór undir eitt serligt átak fyri at kanna, um rætt var uppgivið, kom Taks fram á umleið 600 fólk, sum ikki høvdu uppgivið vinningin av partabrøvum. Tey høvdu harvið brotið lógina um kapitalvinning.

Hesi fólk fingu at hoyra frá Taks, sum ikki bara kravdi tey at gjalda skattin men eisini gav teimum eitt sektaruppskot.

– Tey flestu góðtóku sektarupppskotið men nøkur vildu ikki gjalda, og tey málini hava vit latið politinum, sigur Eyðun Mørkøre, stjóri á Taks.

Umleið 20 mál av hesum slagnum eru latin politinum, sum nú fer at eftirkanna málini og sektaruppskotini.

Sektaruppskotini eru ymisk til støddar, og okkurt er nakrar hundrað túsund krónur.

# Hugt at nýggjum skipi

**Reiðaríið hevur verið í Noregi og hugt eftir einum nótabáti, sum skal avloysa Christian í Grótinum**



Randi Jacobsen

Fyri góðum tveimum árum síðan seldi reiðaríið Christian í Grótinum nótaskipið av sama navni til Kili, har skipið varð bygt.

- Vit hava alla tíðina síðan hugt eftir einum øðrum skipi, sigur Eyðun Rasmussen, stjóri.

Í seinastu viku vóru teir í Noregi og hugdi at nótabátinum Kings Cross (myndin), sum teir meta at vera eitt gott skip. Kings Cross varð smíðaður í 1987.

Í hesi viku fellur avgerðin, um reiðaríið skal keypa hetta skipið.

Nú hevur tað skund at fáa nýtt skip fyri at varðveita loyvið hjá Christiani í Grótinum.




*Sent verður klokkan 21 úr gamla bakarínum hjá Frants Rastorff, og í fyrsta umfari verða tólv sendingar*

# Nýtt føroyskt sjónvarp

**Bakaríið eitur nýggj undirhaldssending, sum leygarkvøldið verður at síggja á Rás 1**

Randi Jacobsen

Seinasta hálva árið hava Peter Slyne og Jákup Veihe spælt við tankan um at gera sjónvarp, og nú er komið á mál.

Fyrsta sendingin verður at síggja á Rás 1 hjá Televarpinum leygarkvøldið. Sendingin varir ein tíma ella so.

– Hetta verður ein undirhaldssending. Vit fara at senda satiru, samrøður og prát við gestir. Set verður beinleiðis, sigur Peter Slyne.

Sendingin hevur fingið navnið Bakaríið, og tað er ikki av tilvild. Teir hava nevniliga leigað gamla bakaríið hjá Frants Restorff í Tórgøtu í Havn.

## Bíligari

Peter Slyne sigur, at teir ikki á nakran hátt fara at kappast tekniskt við kringvarpið, tí tað ber ikki til. Teir satsa burturav upp á innihaldið.

Hetta er í fyrsta umfari ein roynd.

– Eg havi altíð hildið, at tað má bera til at gera sjónvarp bíligari, enn kringvarpið sigur. Tað kann ikki vera rætt, at tað nýtist at kosta so nógv, sigur Peter Slyne.

Sendingin verður fíggjað við stuðlum. Teir renna ikki eftir smúm lýsarum men hava vent sær til tær størstu fyritøkurnar. Fleiri teirra hava játtað at stuðla nýggju sendingina.

Teir hava annars fingið hjálp frá góðum fólki, útgerð hava teir leigað úr Danmark, og Televarpið stendur við ábyrgdini av at senda.

Bakaríið verður at siggja hvørt leygarkvøld.

# Útlendingarnir verða vigaðir

**Útlendingarnir, sum arbeiddu hjá Faroe Seafood, hava fingið hoyringsskriv um uppsøgn. Politiið fer nú at eftirkanna hvørt einstakt mál**

Randi Jacobsen

Tá ið Faroe Seafood fór á húsagang, stóðu fleiri hundrað fólk, føroyingar sum útlendingar, við ongum arbeiði.

Eingin væntaði, at tað fór at ganga so long tíð, til virkini lótu upp aftur, og tí varð skipað so fyri, at útlendingarnir ikki beinanvegin vórðu sendir av landinum men komu undir somu skipanir sum hini arbeiðsleysu fólkini í Føroyum.

Men nú er tilgongdin byrjað, at útlendingarnir, sum einki arbeiði hava í Føroyum, mugu fara heim aftur. Umleið 40 hoyringsskriv eru send politinum í Føroyum frá danska stovninum Udlændingeservice.

Fleiri av teimum útlendingunum eru farnir úr Føroyum, og nøkur hava verið heppin at finna annað arbeiði. Útlendingarnir kunnu tó ikki sum føroyingarnir bara skifta arbeiði. Udlændingeservice skal geva loyvi, og Udlændingeservice hevur lovað at avgreiða tey málini heilt skjótt.